# Tíðin er komin at gevast



**Dávur Joesen, sum átti og enn rekur verkstaðin og sølubúðina hjá Shell í Klaksvík sigur, at hann fer onki at gera aftan á, at Shell hevur tikið yvir virksemið í Klaksvík**

SHELL
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík, Sosialurin:**
- Eg ætli mær á pensjón, sigur Dávur Joensen.

- Eg havi arbeitt sjálvstøðugt í tríati ár nú og havi havt Shellstøðina um hendi, síðani 1985. Fyrst ta gomlu, sum var har bilverkstaðurin hjá Hans Berg Hammer er nú, í nøkur ár, og so ta nýggju, sum liggur beint omanfyri ferjuleguna.

Dávur Joensen sigur, at hann er nøgdur við prísin.

- Tað vóru eisini aðrir bjóðarar, men sáttmálin, sum eg havi við Føroya Shell sigur, at um eg sigi hann upp, so skal eg halda fram í eitt ár,og tað var ikki ætlanin, sigur Dávur.

Hann heldur fram, at nú Shell sjálvir hava keypt, so noyðist hann ikki at siga sáttmálan upp, og harvið sleppur hann undan at halda fram í eitt ár.

Í viðmerking til at Føroya Shell ikki heldur gjørdi nýggja samstarvsavtalu við ein annan keypara, sigur Dávur, at Shell hevur til eina og hvørja tíð rætt til at nokta einum øðrum søluliði, av einari og hvørjari orsøk. Tað veri seg fíggjarligum orsøkum ella øðrum.

- Tað er sera dýrt at reka eina slíka støð. sigur hann.



*Dávur Joensen fer á pensjón aftan á at Shell hevur yvirtikið støðina í Klaksvík*

### Betri møguleikar

- Tað skuldi verið nógv betri møguleikar hjá Shell at farið út at kappast nú, heldur Dávur.

Hann sigur, at nú ráða teir meir.

- Meðan eg framvegis hevði tað, so kundu teir ikki til dømis geva kundum tilboð, tí so talaði Dávur at, tí tað gekk út yvir hansara inntøku í sølubúðini.

- Men tað kunnu teir so nú, staðfestir Dávur Joensen, sum nú gevst.

- Eg gevist við mínum arbeiði nú. Eg havi altíð sagt, at eg skal gevast, áðrenn eg verði seksti. Eg verði 58 næstu ferð eg fylli, so tíðin er komin til tað, sigur Dávur Joensen.

# Shell meira sjónligt í Klaksvík

**- Vit ætla okkum at smoyggja upp um ermar og taka lut í kappingini, sigur Hákun Djurhuus, stjóri á Føroya Shell. Seinasta fríggjadag skrivaðu Føroya Shell og eigarin á bygninginum, sum hýsir Shell í Klaksvík, undir søluavtalu**

SHELL
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík, Sosialurin:**
- Shell skal verða meiri sjónligt í Klaksvík, sigur Hákun Djurhuus.

Hann sigur, at um hann skal døma út frá tí, hann hevur hoyrt úr Klaksvík, so er Shellstøðin ikki so sjónlig, sum hon kundi verið.

Hann vil tó onki siga um, hvørjar ætlanir teir hava við støðini, meira enn, at verkstaðurin verður útleigaður. Og at teir ætla, at reka sølubúðina víðari.



*Hákun Djurhuus, stjóri á Føroya Shell*

Shell hevur oljutangarnar norðuri á Grótrætt,sum er beint norðanfyri Klaksvík á veg til Ánirnar um hendi.

- Tað er so í øllum førum upplagt, at virksemið á Grótrætt fer at samkoyra við støðina, sigur stjórin á Shell.

Umframt tangarnar, er eisini ein skrivstova har tvey fólk sita í fulltíðarstarvi.

### Fleiri bjóðaðu

Føroya Shell hevur samstarvsavtalu við Dáva Joensen, sum átti bygningin og enn rekur verkstaðin og sølubúðina í Klaksvík. Tað vil siga, at Shell eigur pumpurnar og allan útbúnaðin í samband við olju og bensin søluna í Klaksvík, meðan Dávur rekur sølubúðina og verkstaðin

Tað vóru fleiri, sum høvdu áhuga í at keypa bygningin, og Hákun Djurhuus sigur, at hann hevur sjálvur tosað við tríggjar av teimum.

- Eg segði teimum, at vit fóru ikki at gera nakra nýggja samstarvsavtalu, tí tá høvdu vit ikki sjálvir gjørt av um vit skuldu keypa. Og nú vit hava keypt, so sigur tað seg sjálvt, at ein samstarvsavtala er óneyðug. Men ætlanin er, at verkstaðurin skal leigast út, leggur Hákun Djurhuus afturat.

Shell tekur yvir virksemið í Klaksvík um ársskiftið.

# Gongur sum heitt breyð

**Hóast fløgan hjá teim 17 sangarunum í Klaksvík kom út longu í 1999, so gongur hon enn heitt sum heitt breyð kring landið**

TÓNLEIKUR
*Ragnhild Ellingsgaard*

**Klaksvík, Sosialurin:**
Teir 17 sangararnir í Klaksvík hava júst givið út triðja upplagið av fløguni ”17 sangarar – 17 sangir”. Hetta er ein fløga, sum inniheldur føroyskan kórsang, og er fløgan nógv spæld til dømis í útvarpinum.

Triðja upplagið av fløguni er júst komið til landið, og frá teim 17 Sangarum frætta vit, at hetta avgjørt er seinasta upplagið, sum kemur av hesi fløguni.

- Fyrsta upplagið í 1999 var áljóðandi 1100 eintøk, og vóru hesar útseldar beinanvegin. Tí hildu vit tað vera ráðiligt at biðja um 500 eintøk afturat. Men seinasta hálva árið hava fólk ringt frá øllum landinum og kært sína neyð, tí tey ikki fingu fatur á fløguni, og av tí sama valdu vit at bíleggja 1000 eintøk afturat. Men hetta er avgjørt seinasta upplagið, so um fólk ynskja at ogna sær fløguna, so mugu tey út at keypa hana nú, siga 17 Sangarir.

Fløgurnar eru at fáa í flest øllum fløguhandlum kring landið.

### Fara uttanlands

Fyrst í mai mánaða fara teir 17 sangararnir úr Klaksvík at vitja í Danmark, Svøríki og Íslandi.

Ætlanin er fyrst at steðga í Odense, og síðan fara tey víðari til Norrkøping í Svøríki, har 17 Sangarir skulu vera gestir hjá Musikalska Selskabets Kammerkor. Saman við hesum kórinum skulu tey eisini vera við til eina konsert í Ansgar kirkjuni í Norrkøping.

Hetta er tó ikki fyrsta uttanlandsferðin hjá kórinum úr Klaksvík. Seinastu 4 árini hava tey verið í Danmark fleiri ferðir, umframt at tey eisini hava vitjað í Noregi og Skotlandi.



*Myndin er tikin í Bon Accord sentrinum í Aberdeen, tá 17 Sangarir vóru á ferð í Skotlandi*



Ung í Runavík:

# Vit keða okkum!

**Ungdómurin í Runavíkar kommunu, sigur, at hann keðir seg, tannáringarnar vilja hava eitt ungdómshús og tey eldru yvir 18 ár vilja hava eitt dansistað við skeinkiloyvi. Trupulleikin hevur leingi verið, men enn hevur ongin gjørt nakað við tað, siga tey**

*Elsa Johannessen, praktikantur*

- Ein tímur mest sum ikki at ganga úti um kvøldarnar meir, tí onki er at fara til, segði ein 16 ára gamal tannáringur.

Støðini ið tey kunnu fara á eru Sjómansheimið, OrBits, ið er ein teldukafe, og grillin á Høgabóli. Álíkavæl eru tey ikki nøgd.

- Vit vilja gjarna hava eitt ungdómshús, har vit kunnu fara og hugna okkum saman, við at spæla pool, lurta eftir tónleiki, hyggja sjónvarp og sovorði, søgdu tannáringarnar.

- Hevði eitt stað við skeinkiloyvi komið, har ein kundi møtast við vinum, spælt pool, og drukkið eina øl av og á. Nakað sum minnir um Stokkastovuna, har skuldi bara verið eitt sindur meir skil á, segði ein 23 ára gamal drongur.

Ynskini eru næstan líka hjá tannáringunum, sum hjá tí eldra ungdóminum. Sagt hevur verið at fleiri umsóknir vóru komnar til tílíkt, men tá ið Rodmund Nielsen, Borgarstjóri, varð spurdur, bleiv annað sagt:

"Vit hava hugsað um hetta, og ein fundur verður áðrenn summarfrítíðina, har tað millum annað verður tosað um ungdómin í Runavíkar kommunu. Eg veit sjálvur um hetta við ungdóminum, men tað eru ikki vit ið skulu syrgja fyri sovorðnum. Ongar umsóknir hava verið enn um dansistøð við skeinkiloyvi, meðan eg havi verið her, heldur ikki um nakað annað til ungdóminum. Vit vita at tað er nógv at fara til innan fyri ítróttin, og samkomurnar gera eisini nógv. Og tá ið okkurt hevur verið, sum fyri tveimum vikum síðani, skipaði Støkk fyri dansi í Støkkhøllini við Flux, møttu fá upp. Tí vil eg ráða ungdómin til, at tá ið okkurt felag skipar fyri dansi og konsertir, so møtið upp, stuðla felagnum, so at tey tíma skipa fyri nøkrum aftur. Tað nyttar onki at skipa fyri nøkrum, um ongin fer til tað.

Eisini hevði ungdómurin kunna hugsað sær eitt fitness-sentur, bowlinghøll og biograf. Kommunan hevur enn ikki ábyrgdina av at nakað slíkt skal koma, og ongin hevur søkt um at opna eitt slíkt stað enn. Men ungdómurin úr Runavíkini vónar tað besta til fundin, sum skal vera áðrenn summarfrítíðina.

# Smyril á beding í tvær vikur

**Scania skal røkja suðuroyarsiglingina í 14 dagar, tí Strandferðslan fær onki betri avloysaraskip**

SUÐUROYAR-SIGLINGIN
*Áki Bertholdsen*

Hetta er tíðin tá ið skipini hjá Strandferðsluni fara á beding til árligt eftirlit.

Aftur í ár skal Smyril á beding, men hesuferð er tað longu greitt, hvat avloysaraskipið verður.

Smyril skal á beding á Skála fyrst í mei mánaði. Gongst sum ætlað, verður hann standandi á beding í 12 dagar, frá mánamorgun til fríggjakvøldið eftir, so at hann missir bara eitt vikuskiftið.

Hesa tíðina, Smyril er á beding, verður tað ferjan Scania, sum skal røkja suðuroyarsiglingina.

Magnus Magnussen, tekniskur stjóri á Strandferðsluni, sigur, at teir hava leitað eftir hósakandi avloysaraskipið síðani í heyst, men at tað er onki at fáa.

– Scania er tað best hóskandi skipið, sum tað ber til at fáa, sigur hann.

Scania er ikki heilt á sama støði sum Smyril og tí slepst ikki undan, at talan verður um eitt afturstig í tænastuni hjá teimum, sum brúka suðuroyarleiðina, hesa tíðina, Smyril er á beding

Scania tekur 70-80 bilar og tað eru 30-40 bilar færri enn Smyril. Hon siglur 14,5 míl, tvs, at ferðin ímillum Suðuroy og Havnar fer at taka næstan tríggjar tímar, ella trý korter longri enn nú.

Heldur ikki hevur Scania stabilisatorar.

Manning frá Strandferðsluni er farin eftir Scaniu, men áðrenn hon verður sett í suðuroyarsigling, skal hon sigla um Lorvíksfjør fyri Dúgvuna í allan apríl mánað, sum eisini skal á beding til eftirlit.

### Nossligari skip

Men tá ið Smyril kemur aftur í sigling verður talan um eitt munandi nossligari skip. Umframt at bógskrúvuna og annað skal kannast eftir kravi frá sýninum, skulu teppi og gardinur, skiftast, nýggj flúgvarsetur setast í og skipið yvirhøvur hampast innan, so at tað verður hugaligari hjá ferðafólki.


PÁSKAÚTSØLAN HJÁ BERG MOTORS HELDUR FRAM

Leygardagin hava vit opið frá kl. 10-16

| | | |
|---|---|---|
| Mazda B2500 RegCab 4x2 DX grønur, v/ smáskaða, 142.700,- | avsláttur 30.000,- | 112.700,- |
| Mazda B2500 Plus Cab 4x2 DX reyður, v/ smáskaða, 154.700,- | avsláttur 30.000,- | 124.700,- |
| Mazda B2500 DubultCab 4x4 DX grønur, v/smáskaða, 258.700,- | avsláttur 30.000,- | 228.700,- |
| Mazda B2500 DubultCab sum vørubilur grønur, v/smáskaða, 208.700,- | avsláttur 30.000,- | 178.700,- |
| Mazda E2200 Glasvan DX bláur, v/smáskaða, 159.700,- | avsláttur 25.000,- | 134.700,- |
| Mazda 323 4SDN 1,6i Touring svartur, v/smáskaða, 188.700,- | avsláttur 34.000,- | 154.700,- |
| Mazda 323 5HB 1,6i Touring gráur, v/smáskaða, 196.700,- | avsláttur 34.000,- | 162.700,- |
| Mazda Premacy 5HB 1,8i LX gull, v/upprudding, 178.700,- | avsláttur 13.000,- | 165.700,- |
| Mazda Premacy 5HB 1,8i GLX bláur, v/Demo-bilur, 190.700,- | avsláttur 20.000,- | 170.700,- |
| Mazda Premacy 5HB 2,0DiTD LX grønur, v/smáskaða, 218.700,- | avsláttur 25.000,- | 193.700,- |
| Mazda Premacy 5HB 2,0DiTD LX bláur, v/smáskaða, 218.700,- | avsláttur 30.000,- | 188.700,- |
| Mazda 626 4SDN 1,8i 100HK Comfort grønur, v/upprudding, 192.700,- | avsláttur 30.000,- | 162.700,- |
| Mazda 626 4SDN 1,8i Comfort grønur, v/upprudding, 192.700,- | avsláttur 30.000,- | 162.700,- |
| Mazda 626 4SDN 2,0i 115HK Exclusive grønur, v/upprudding, 201.700,- | avsláttur 30.000,- | 171.700,- |
| Mazda 626 4SDN 2,0i 115HK Exclusive beige, v/upprudding, 201.700,- | avsláttur 30.000,- | 171.700,- |
| Mazda 626 4SDN 2,0i 115HK Exclusive gráur, v/upprudding, 201.700,- | avsláttur 30.000,- | 171.700,- |

Ein rúgva av brúktum bilum verða eisini seldir sera bíliga

BERG MOTORS
Staravegur 1-3 • Tel. 31 35 35 • Fax 31 77 35